# Heðin formaður í Havnar Framburðsfelag

TÍÐINDASKRIV

Havnar Framburðsfelag, valfelag Fólkafloksins í Suðurstreymi, hevði aðalfund leygardagin. Eini 50 fólk vóru møtt. Nýggj nevnd varð vald. Fyri Jan Christiansen og Petur á Lava Olse, sum ikki ynsktu afturval, vórðu valdir Poul Laust Christiansen og Marita Hentze Eftir aðalfundin skipaði nevndin seg við Heðin D. Poulsen sum formanni, Aaga Arnoldson sum kassameistara, Poul L. Christianssen sum skrivara og Elsa í Garið og Maritu Hentze sum nevndarlimir. Sum varalimir vóru valdir Jan Christiansen og Inga Dahl.

Eftir sjálvan aðalfundin, hevði Jan Christiansen, Óli Breckmann og Bjarni Djurholm stutt innlegg um politisku gongdini tað síðsta árið og um framtíðar politiskar visiónir.

Johnny í Grótinum, formaður í Búskaparráðnum, hevði síðani eina framløgu um hvør er best egnaður at finna vinnarar, politikarin ella marknaðurin. Framløgan hjá Johnny var sera áhugaverd og rakti við nógv viðkomandi viðurskifti. Niðurstøðan var, at sjálvandi er marknaðurin best egnaður at finna vinnarar, tí tess meira politikarar blanda seg, truplari og skeivari gerst gongdin. Politikarin skal syrgja fyri, at karmarnar eru til staðar og innan hesar karmar skal vinnan hava frítt at virka.



*Heðin D. Poulsen*










Ognað tær bókina, ið lýsir 100 ára søgu Sørvágs Ítróttarfelags:

**Sørvágs Ítróttarfelag 100 ár**

Verður sent óportað. (Móttakarin rindar postgjaldið)
334

Send [ ] eintak/eintøk **á 250,00 kr.** til :

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Býur/bygd: ____________________

Telefon: ____________________

**Móttakari:**

**ESBERN JOENSEN**
**380 SØRVÁGUR**
tlf.: 210233

Klipp út og send



## Ársaðalfundur

**Boðað verður við hesum til ársaðalfundar í P/F Føroya Banka**

**hósdagin 31. mars 2005 kl. 17 .00**

á Hotel Føroyum, Tórshavn, við hesi dagsskrá:

1. Frágreiðing nevndarinnar um virksemi bankans í farna ári.
2. Framløga av ársroknskapi við grannskoðaraátekning til góðkenningar og ársfrágreiðing.
3. Avgerð um nýtslu av avlopi sambært góðkenda ársroknskapin.
4. Val av nevndarlimum.
5. Val av grannskoðarum.
6. Uppskot frá nevndini:

   *Nevndin mælir til, at hon fær heimild til innan endan av mars 2006 at lata bankan ognast upp til 1 pst. av partapeningi bankans fyri ein kurs, sum ikki kann víkja frá seinasta almannakunngjørda innara virðinum við meira enn 10 pst.*

7. Ymiskt.

Grannskoðaði ársroknskapurin og ársfrágreiðingin liggja frammi á skrivstovu bankans í Húsagøtu 3 í Tórshavn.

Atgongumerki til aðalfundin verða útflýggjað á deildum bankans í seinasta lagi mikudagin tann 23. mars 2005.

Tórshavn, tann 18. februar 2005.

NEVNDIN

FØROYA BANKI



21.-25. april '05

WWW.SMYRIL-LINE.COM

# GOSPEL-TÚRUR



Hin 21. apríl verður Á fyrsta sinni skipað fyri einum gospeltúri við Norrönu. Luttakandi tónleikarar og sangarar umboða tað besta, vit eiga innan føroyskan gospeltónleik og spenna sera vítt.



**Umborð verður m.a:**

- Góður gospel-tónleikur
- »Syngið við« tiltak
- Barnaundirhald við gyklara
- Tax-free søla
- Ókeypis fitness-venjing
- Góður matur

**PRÍSIR**

| | |
|---|---|
| 4 koyggju kamar, innan | 600,- |
| 4 koyggju kamar, uttan | 700,- |
| 3 koyggju kamar, innan | 800,- |
| 3 koyggju kamar, uttan | 900,- |
| 2 koyggju kamar, uttan | 1.000,- |

Prísurin fatar um ferð fram og aftur á farleiðini Tórshavn-Hanstholm.
Oljuavgjald á kr. 120,- er ikki íroknað.
Øll kømur hava wc/bað.



**Luttakarar verða:**

- Magni Christiansen
- Gospelbólkur úr Lívdini
- Sigrid Sivertsen Band
- United Voices
- Kingo-bólkurin

**FYRI HVØNN úr 600,-**

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370
FO-110 Tórshavn · Tlf: 34 59 00
Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo

SMYRIL LINE